# Andras Róin nýggjur formaður í Smyril Line

**Nevndin í P/F Smyril Line hevur fingið tveir nýggjar limir. Andras Róin er nýggjur nevndarformaður, og Leif Abrahamsen er vorðin nevndarlimur. Teir koma inn í nevndina fyri Edvard Heen og Thomas Magnussen**

SMYRIL LINE

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Á aðalfundinum í P/F Smyril Line mánadagin 3. apríl 2006 fór ein útskifting fram í nevndini í reiðaríinum. Broytingin ber í sær, at nýggjur formaður og ein nýggjur limur eru valdir í nevndina.

Nýggjur nevndarformaður er Andras Róin, stjóri á Føroya Tele. Hann tekur við sum formaður eftir Edvard Heen, ið hevur verið formaður eitt skifti. Edvard Heen tók herfyri við sum privatkundaleiðari í Føroya Banka, og orsakað av ásetingum í banka- og sparikassalógini ber honum ikki til at halda fram sum nevndarformaður í Smyril Line.

Nýggi nevndarlimurin er Leif Abrahamsen. Hann starvast dagliga sum stjóri á Føroya Gjaldstovu og tekur við nevndarsessi, ið Thomas Magnussen hevur havt. Thomas Magnussen gjørdist 1. desember 2005 stjóri í Smyri Line, og nú hevur hann lagt nevndararbeiðið til viks til fyrimuns fyri starvið sum stjóri.

FT Holding hevur valt Andras Róin í nevndina, meðan Framtaksgrunnur Føroya hevur kosið Leif Abrahamsen sum nevndarlim. Teir báðir tóku sæti í nevndini í Smyril Line frá fyrradegnum at rokna.

Nevndin í Smyril Line telur nú hesar limir:
Andras Róin, formaður
Leif Abrahamsen
Jónas Hallgrímsson
Sandy Cluness

# Nesborg er seldur til Gibraltar



SKIPASØLA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fyrsta dagin fer Feskfiskatrolarin Nesborg til Spania, har skipið verður gjørt út til fiskiskap í Afrika.

»Nesborg« úr Vági hevur partrolað við »Nesborg 1«, sum fekk nýggjan maka, ið P/F Tvøran keypti fyrr í ár úr Noregi.

Tað var skipsmeklaravirkið MARETEC á Argjum, sum skipaði fyri søluni av »Nesborg«, sum nú fer til vestur-afrika at royna seg har.

Føroyingar skulu sigla skipið til Spania, har tað síðani verður gjørt út til fiskiskap í Afrika.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 14 2006

# Góðir roknskapir í væntu

MARKNAÐARRÁK

Farna vikan hevur verið friðarlig á fíggjarmarknaðunum. Tó megnaðu norrøn partabrøv at hækka 1%. Higartil í ár eru tey hækkað 14%, og gongdin frá trimum teim undanfarnu árunum er sostatt hildin fram í ár. Eitt, sum hevur sera stóran týdning fyri, um hetta góða rák eisini verður varðveitt hendan mánaðin, eru roknskapirnir fyri 1. ársfjórðing. Teir fyrstu verða kunngjørdir longu áðrenn páskir. Sum vanligt eru tey amerikonsku virkini skjótari at kunngera enn tey evropisku. Amerikonsku roknskapirnir hava týdning fyri partabrøv á okkara leiðum, tí gongdin á ymsu partabrævamarknaðirnir fylgist í ávísan mun. Tað er ikki bert avgerandi, at virkini kunngera góðar roknskapir. Teir skulu eisini vera betri enn marknaðurin væntar, fyri at føra til hægri kursir.

## Renturnar hækkaðar aftur

10-ára danska lánsbrævarentan kom týsdagin burtur úr strekkinum 3,70%-3,75%, sum hon hevði ligið í 2-3 vikur. Og sum væntað varð tað við eini hækkan. Danska 10-ára rentan liggur í løtuni um 3,91%, og útlit eru fyri, at hon hækkar eitt vet aftrat.

## Maersk og Vestas í andgletti

Kunngerðirnar frá Vestas og Mærsk vaktu stóran ans í farnu viku. Vestas hækkaði 25%, tá tað gjørdist greitt at tørvurin á nýggjum kapitali var nógv minni enn væntað og at betur skil var komið á mannagongdirnar. Eisini fingu tey eina stóra bílegging úr Kina. Kursurin á Mærsk lækkaði heili 15% mikudagin, tá úrslitið bert gjørdist 20,2 mia. kr. Hetta kom sera dátt við hjá greinarum, ið við stórari vissu høvdu mett úrslitið til 25 mia. kr. Eftirfylgjandi er Mærsk tó hækkað 5% aftur. Danska vísitalið OMXC20 lækkaði 4% hendan dagin, men er hækkað 2% aftur.

## Hesa vikuna

Størsta hendingin hesa vikuna verður uttan iva amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin, sum kemur fríggjadagin. Hetta er ein tann greiðasta ábendingin um standin hjá amerikanska brúkaranum. Annars verður eisini dentur lagdur á oljuprísin, nú Iran roynir nýggj vápn.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 614,77 | -1,0% |
| JPY | 5,22 | -1,8% |
| GBP | 1.069,25 | -1,4% |
| NOK | 94,79 | 0,9% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 100,41 | -0,5% |
| Evru Lánsbrøv | 169,03 | -0,6% |
| Norrøn Partabrøv | 120,84 | 1,6% |
| Altjóða Vøkstur | 74,15 | -0,3% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*